# Röða
# forseta Íslands
# Guðna Th. Jóhannessonar
# í móttöku til heiðurs fyri Föroya lögmanni
# Akseli V. Johannesen
# Norðurlandahúsinum
# Tórshavn
# 18. mai 2017

Háttvirdi lögmaður,
kæru vinir!

Á hesum stað er upplagt at hugsa um norrönt samstarv. Seinni í ár verða liðin fýra áratíggju, síðan tveir arkitektar vunnu kappingina um at tekna norðurlandahús her í Föroyum: Ola Steen úr Noregi og íslendingurin Kolbrún Ragnarsdóttir. Föroyingar lögdu alla orku í byggingina, fluttu inn svenskt timbur, flísar úr norskum flögugrýti, glas og jarn úr Danmörk, finskt innbúgv og íslendska takgerð. Árið 1983 var hetta hús vígt, og kann tað av sonnum nevnast Norðurlandahúsið.

Byggingin av Norðurlandahúsinum var stórt framstig í sjálvstýrissögu föroyinga, sum hevur djúpar rötur. Eftir landnám varð við tíðini til serstök tjóð her á landi við egnum tungumáli og mentan. Ritmálið hvarv um trúbótarmundið, og tað var ikki fyrr enn um miðja nítjandu öld, at tað kom afturíaftur, tá sum öllum kunnugt presturin og málfröðingurin V. U. Hammershaimb gjördi reglur um föroyska málfröði og stavseting, sum bygdu meiri á uppruna orðanna heldur enn framburðin í samtíð hansara. Í hesum starvi fekk hann hjálp frá vini sínum, Jóni forseta Sigurðsyni, sjálvstýrishetju okkara íslendinga – og vit kunnu tí eisini takka Jóni fyri – umframt alt annað – at vit kunnu lesa föroyskt uttan stórvegis trupulleikar. Talaða málið er verri at skilja.

Kæru vinir, eg fari ikki at nevna allar lögasteinar á leið föroyinga, sum ber móti alsamt vaksandi sjálvræði. Eins og heima í Íslandi hava tilburðir úti í heimi havt mikla ávirkan: ófriður í Evropa ella stórkríggj. Tað hevur almiklan týdning fyri okkum at styrkja búskapin, fjöltátta hann og minka um teir náttúruvandar, sum hótt okkum hava allar dagar. Ongantíð mugu vit undirmeta tann týdning, mentan og tungumál hava, og vit eiga altíð at nýta tungumál tjóðarinnar í

skúlum og stovnum. Heima í Íslandi var stovnsetingin av Háskóla Íslands árið 1911 týdningarmikið framstig, og samsvarandi stig tóku föroyingar, tá ið Fróðskaparsetur Föroya var sett á stovn fyri stívliga hálvari öld síðan, og er tað alsamt síðan vaksið og ment.

Eg freistist til at nevna ítróttabrögd. Tey styrkja meiri enn nakað annað samstöðu og fosturlandskærleika. Sjálvur havi eg stóran áhuga fyri ítróttum. Eg skal siga, sum er, at tað fer mær aldri úr minni, tá ið tað óvæntaða, gleðiliga hendi, at landslið Föroya í mansfótbólti sigraði í sínum fyrsta leiki í altjóðakapping heystið 1990. Venjarin var íslendskur, sum öllum kunnugt: Páll Guðlaugsson, og eg loyvi mær at endurgeva síðstu eldhugaðu tileggjan hansara fyri dyst, tá hann segði við leikarar sínar: „Hugsið um föroyska flaggið, flagg tykkara. Takið tað við tykkum inn á völlinn … vinnið dystin fyri fólk tykkara!“

Eisini vil eg nevna, at fyrsta uttanlandsferð mín sum forseti gekk til Rio í Brasil, tá ið olympisku leikir teirra brekaðu vóru hildnir har. Har sá eg föroyska flaggið blaktra, har kappaðist Krista Mørkøre og stóð seg væl. Seinni í summar fer U21-manslandsliðið í hondbólti at taka lut í heimsmeistarakappingini í Algeria, og kvinnulandslið okkara í fótbólti er í sama bólki sum tykkara í undankappingini til heimsmeistaraskapin í Frakklandi árið 2019. Vit íslendingar ynskja tykkum góða eydnu – men ikki tá tit spæla ímóti okkara liði. Eingin er annars bróðir í leiki, sigur hitt gamla orðafelli okkara.

Við hesum eina undantaki beri eg tykkum föroyingum bestu ynski um eydnusama framtíð. Her í Norðurlandahúsinum skal eg leggja herðslu á, at sera umráðandi er, at vit standa saman í viðgangi og mótgangi, öll ríki Norðurlanda og tær tjóðir, sum tey byggja, heilt frá grönlendingum í vestri til finna í eystri. Föroyska tjóðin stendur fyri at taka stórar avgerðir, boðað er frá fólkaatkvöðu komandi ár, sum hevur til endamáls at tryggja rætt föroysku tjóðarinnar at fara ymsar leiðir, sum síðan kunnu fremjast í verki. Valið er tykkara, soleiðis eigur at vera. Í tí leiðangri er gott at eiga – og hava í huga – skaldskap Janusar Djurhuus, eittnú ta fögru hugsjón hann ber fram við hesum orðum, sum eru vorðin leiðarorð Fróðskaparseturs Föroya: „Mildar veittrar tendraðu ein vita Føroyum stjørnuleið frá øld til øld.“